# List, sum fær teg at smíla



Mentanarnáttina letur ein av teimum stuttligu listaframsýningunum upp. Janus á Húsagarði letur tá upp framsýning við sínum nýggjastu verkum, ið hann vónar kann fáa hyggjaran at undrast og smílast

Ein listaframsýning, sum letur upp Mentanarnáttina, er ikki komin á skránna. Tað er listaframsýningin hjá Janusi á Húsagarði. Hann letur Mentanarnáttina upp framsýning í Stephanssons Húsi á Kongabrúnni, og er framsýningin eitt úrslit av verkum, hann hevur gjørt síðan mars mánað í ár. Tað var tá hann tók avgerð um at gevast við at arbeiða sum snikkari, og í staðin nýta alla sína tíð til at tekna.

- Men so var eg so óheppin, at eg datt og økslin fór úr lið. Tá fekk eg so ikki gjørt so nógv. Men stórt sæð alt, sum hongur her, er frá í ár, sigur Janus á Húsagarði.

Janus á Húsagarði er ein sera dugnaligur teknari, ið hevur sermerkt seg við sínum heilt serliga stíli. Fleiri kenna helst til ólavsøkutekningarnar og tekningarnar av fuglum í bjørgunum við ymiskum stuttligum smálutum, ið hann fyri nøkrum árum síðan teknaði. Síðan hevur hann gjørt tekningar til barnabøkurnar Dunnuungin Pu og Drongurin, sum gloymdi hvussu mann spælir, og í fjør gav hann út sína egnu bók um lítla trøllið, Mosamollis. Mosamollis er bók uttan tekst, og er tað upp til lesaran at avgera hvussu søgan skal vera um Mosamollis. Í heyst hevði Janus á Húsagarði framsýning við fittu tekningum úr bókini, og tá seldi hann øll verkini. Ætlanin er at geva eina bók út afturat, hesa ferð um eitt gentutrøll.

## Smíl til trøllið

Framsýningin, sum letur upp fríggjadagin, hevur tveir ymiskar stílir. Tann eini stílurin er ein røð av steinmyndum við fuglum sitandi á steinunum, og hin er myndað av tekningum av trøllalandslagnum, sum Janus hevur arbeitt nógv við. Tað er kortini grótið við fuglunum, ið fyllir mest.

- Tað er nógv grót á Kirkjubøreyni, har eg ofta gangi túrar, og oman fyri har vit búgva. Eg havi altíð gingið nógv í haganum og eygleitt fuglar og grót, og tað er har, íblásturin til hesar tekningarnar kemur, sigur Janus á Húsagarði um tekningar sínar.

Á steinunum, hann hevur teknað, sita fuglar av ymsum skapi og støðd, og millum steinarnar sita trøll og lúra, sum ein sær, tá ein hyggur nærri.

- Eg vóni, at fólk fara avstað aftur við einum smíli, tá tey hava verið á framsýningini, sigur Janus á Húsagarði.

Framsýningin letur upp fríggjadagin klokkan 17, og verður hangandi teir næstu 14 dagarnar.

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

# Himmalin hjá Guðrið opnar seg



*Til ber at fáa ein forsmakk uppá The Sky is Opening, tá móttøka verður í MESS skrivstovuni klokkan 22.00*
*Mynd: Heiðrik á Heygum*

Guðrið fer Mentanarnáttina at geva ein forsmakk upp á hvussu hennara himmal ljóðar. Útgávukonsertin er sett at vera 13. juni, men Mentanarnáttina ber til at fáa ein forsmakk, tá The Sky is Opening kemur á gøtuna

Guðrið Hansdóttir kemur út við nýggjari fløgu sjálva Mentanarnáttina. 5. juni. Fløgan ber heitið The Sky is Opening, og við á fløguni eru 11 løg, níggju á enskum og tvey á føroyskum. Umframt egnar tekstir, hevur Guðrið eisini gørt løg til yrkingar hjá millum øðrum Guðrið Helmsdal (Mjørkanáttin), Róa Paturssyni (Flower Brother) og Siggu-Mariu Højgaard (On My Own Two Feet, Sleep, Stjørnur).

- Tónlistarliga og stílmessiga er tónleikurin á The Sky is Opening ikki tann sami, sum á fyrru útgávuni Love is Dead frá 2007. Nýggi tónleikurin er meir búgvin og djúpur, og sjangran fer meira út í folk/pop og minni rock. Løgini snúgva seg enn um kærleika og um ymiskar hendingar í lívinum, men hava meira jaligan tóna og minni sorgblídni, sigur Guðrið Hansdóttir um sína nýggju útgávu.

Tónleikurin á fløguni er ein blanding av svenskum poppi við íblástri frá fólkatónleiki og 70 ára rokki. Fleiri klassisk ljóðføri eru við á løgunum, og einans gomul ljóðføri vóru nýtt í studionum. Elsta ljóðførið, sum er eitt pumpuorgul, er frá 1910 og yngsta ljóðførið var Gibson guitarin hjá Guðrið frá 1994.

Upptøkurnar vóru gjørdar í nýggju upptøkuhølunum hjá Jónas Bloch, og varð fløgan miksað í Berlin.

## Forsmakkur fæst Mentanarnáttina

Nýggja fløgan verður at fáa í handlunum fríggjadagin 5. juni, og í hesum sambandi verður móttøka í skrivstovuni hjá Mess í Niels Finsensgøtu klokkan 22.00. Guðrið fer at spæla nøkur løg av útgávuni, og eisini verður høvi at ogna sær fløguna og keypa